# Tú skalt sjálvur

– Vit, sum fáast við børn og ung, mugu ikki gerast ov fastgrógvin og halda, at skúlin og næmingarnir ikki kunnu vera okkum fyri uttan. Maður kemur í mans stað enn sum áður, sigur Johan Samuelsen, sum nú er farin undir nýtt lívsskeið



*Heimið og uttanumhvørvið hjá familjuni Samuelsen er væl lagt til rættis. Allir hentleikar eru til staðar, sum gera, at Johan kann ferðast inni og úti. Serliga væl dámar honum at fara út í urtagarðin at arbeiða. Tað er eingin trupulleiki, av tí at hann er gjørdur soleiðis í hædd og vavi, at atkomiligt er við koyriststóli*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SAMRØÐA

*Dagny Joensen*

Tað er ikki koyristólurin, sum kemur við 59 ára gamla Johan Samuelsen - heldur hinvegin - Johan Samuelsen kemur *við* koyristóli.

Hann fyllir nógv í almenna rúminum, er nærum tveir metrar til hæddar og so breiðvaksin, at tú í fyrstu syftu ikki leggur til merkis, at hansara stólur er øðrvísi enn aðrir, bert at hjólini krevja meira pláss. Annars er hann tann, sum tekur orðið og er greiður í síni talu. Skemtiligur og brosandi, sum hann er í síni medferð.

Hann hevur verið lærari í 36 ár, og sum Johan Samuelsen sjálvur sigur - 26 tey seinastu árini sum sitandi lærari.

Tað merkir ikki, at hann hevur verið óvirkin í sínum starvi, men meira, at hann sum 33 ára gamal fekk so álvarsliga sjúku, at hann kom at sita í koyristóli restina av lívinum.

Tað hevur kortini ikki forðað honum í at liva eitt so vanligt lív sum til ber, bundin sum hann er av at fáa hjálp frá øðrum.

Nú nýggja skeiðið byrjar, heldur hann tað vera frálíkt at sleppa frá at vera innilæstur í einum skema, har gerandisdagurin ikki longur er merktur av arbeiði.

- Hvat eg fari at gera? Eg fari at njóta familjulívið við øllum tí, sum tað inniber. Harnæst fari eg lurta, lesa og skriva og gera alt tað, sum eg ikki havi havt stundir til í arbeiðslívinum, sigur Johan Samuelsen.

Sum ungur maður fór hann á háskúla í Haslev, og tá skeiðið var av, hevði hann ikki hug at fara heimaftur beinanvegin, men vildi royna okkurt annað. Tá fór Johan til skúlastjóran og spurdi, um hann ikki kendi onkran skúla í Bretlandi at vísa sær á.

- Skúlastjórin kendi ongan í Bretlandi, men skaffaði mær pláss á háskúla í í Eysturtýsklandi, sum tá var.Tað vakti áhuga mín fyri málinum og var ein orsøkin til, at lærarastarvið gjørdist mítt lívsstarv, sigur Johan Samuelsen.

Heimafturkomin fór hann á Læraraskúlan og fekk prógv í 1969. Hann giftist við Jóhonnu og tey fingu trý børn, og eiga í dag eisini fimm barnabørn.

Johan er havnarmaður burturav. Hann føddur og uppvaksin í Hornabø og hevur traðkað sínar barnaskógvar í Álakeri, Sandagerði og á Vestarubryggju.

Tað var tí ongantíð ætlanin at hann skuldi arbeiða aðrastaðni enn í Havn.

## Ódámlig sundurskiljing avtikin

Eftir lokna útbúgving fór hann í starv í Kommunuskúlanum.

- Tá eg kom í starv í Kommunuskúlanum vóru skúlarnir har lagdir saman. Tað var gamli Realskúlin fyri sunnan og Kommunuskúlin fyri norðan, men millum skúlarnar báðar var ein girðing, sum gjørdi, at einki samband var millum skúlarnar, greiðir Johan frá.

- Eg minnist einu ferðina, at ein smádrongur kleyv upp í girðingina og ein gamal lærari í realskúlanum segði: "Nei, gamli, higar kemur tú ikki klúgvandi, men flúgvandi í andanum".

Teir gomlu lærararnir hildu ógvuliga fast um, at talan var um tveir skúlar og vildu ikki blanda realskúlabørnini við hini í "gulaskúla". Ólavur Michelsen, sáli, sum tá var býráðslimur, gjørdi bart eitt summarið og tók girðingina niður, áðrenn skúlarnir byrjaði aftur eftir summarfrítíðina.

- Fyri at siga tað sum er, so var sundurskiljingin av børnunum í 8. flokki og Realskúlanum ódámlig og ikki rættvís í øllum førum, sigur Johan Samuelsen, sum dámdi væl at undirvísa og helt nógv av børnunum.

Havnin vaks skjótt hesi árini og fleiri skúlar komu til, fyrst Venjingarskúlin og síðani Eysturskúlin.

Um broytingarnar í tíðini hann var lærari, sigur Johan Samuelsen, at børnini í dag eru nógv fríari. Tey eru von við at vera í barnagarði, so tað er ikki nakað nýtt hjá teimum, at fara í skúla.

- Áður var innskúlingin øðrvísi. Tá vóru børnini ógvuliga smæðin og vildu ikki sleppa mammuni fyrsta skúladagin. Tú kanst siga, at virðingin fyri teimum vaksnu var størri, og at tað gjørdi arbeiðið hjá lærarnum léttari. Tá var gamla undirvísingarmynstrið at lærarin undirvísti og síðani vóru børnini yvirhoyrd. Tey skuldu bert duga at endurgeva tað, sum lærarin segði.

Nýggja tíðin kom við nýggju skúlalógini. Tað var ein kollvelting í skúlaskapinum, at øll børn-